# Toftabørn vitja á Viðareiði

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av útsynningi, týsdagin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

**Mikudagin vóru elstu børnini í dagrøktini á Toftum á vitjan í spælistovuni hjá dagrøktarunum á Viðareiði**

VITJAN
*Solby A. Eliasen*

**Viðareiði:** Mikudagin vóru børn úr dagrøktini á Toftum á vitjan í Klaksvík og Viðareiði. Tey vitjaðu fyrst løgreglustøðina og Føroya Bjór í Klaksvík, og síðani fóru tey til Viðareiðis at vitja spælistovuna hjá dagrøktini har.

Tá Sosialurin kom framvið spælistovuni á Viðareiði, angaði tað av nýbakaðum vaflum langt út í gongina. Ikki hugsaði ein um, at tað vóru umleið 30 børn inni, tí tað var sera friðarligt. Børnini sótu og spældu so fitt við tey lítlu borðini inni í stovuni. Summi løgdu puslispæl, summi spældu við bilar og upp aftur onnur sótu og teknaðu.

Tey lótu seg slettis ikki órógva av, at fólk kom á gátt, men hildu í staðin áfram við teirra spæli.

Dagrøktarleiðararnir báðar siga, at hetta við at vitja hvønn annan hevur vundið meira upp á seg, síðani dagrøktarleiðararnir eru farnir at hittast einaferð um mánaðin.

Ongin dagstovnur er á Viðareiði, og dagrøktin er normerað til 30 børn, men tey eru heldur fleiri í tali, tí at summi eru bert hálva tíð. Tørvurin verður nøktaður sum er, so ongin bíðilisti er á Viðareiði.



*Børnini í spælistovuni á Viðareiði fingu vitjan av Toftum mikudagin, og tað lá væl fyri hjá teimum at spæla saman*

Børnini í dagrøktini á Viðareiði eru í aldrinum seks mánaðir til tíggju ár. So væl stendur ikki til á Toftum. Har er normeringin 65, men har er ein lítil bíðilisti. Hvussu vónirnar eru fyri, at hann verður burtur, er ikki lætt at meta um, heldur dagrøktarleiðarin.

Á Toftum eru børnini somuleiðis frá seks mánaðum og upp til seks ára aldur. Tað seinasta árið, áðrenn tey fara í skúla, ganga tey í útibarnagarði.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | 16 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 20 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 30 |
| Róm | – |
| Malorca | 30 |
| Athen | 29 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 16 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 985 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga norðureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi dagarnar.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað og grynnist framvegis.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/06 kl. 06[00]– 19/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 17,9 mm – mált frá 18/06 kl. 06[00]–19/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 82,8 mm


JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn


## VESTFALLSKYRRINDI

12. juni: Mánin næstur jørðini
14. juni: Fullmáni
21. juni: Seinna kvarter
25. juni: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/Vágafirði | | Skúvoyar-/Skopunarfirði | | Hestfirði/Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/Haraldssundi | | Kalsoyar-/Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 20. juni | 00.10 | 12.31 | 11.31 | — | 11.46 | — | 02.10 | 14.31 | 03.10 | 15.31 | 10.46 | 23.20 | 09.46 | 22.20 | 00.25 | 12.46 | 01.25 | 13.46 | — | 12.16 | 01.10 | 13.31 |
| 21. juni | 01.05 | 13.40 | 00.05 | 12.40 | 00.20 | 12.55 | 03.05 | 15.40 | 04.05 | 16.40 | 11.55 | — | 10.55 | 23.28 | 01.20 | 13.55 | 02.20 | 14.55 | 00.50 | 13.25 | 02.05 | 14.40 |
| 22. juni | 02.13 | 14.47 | 01.13 | 13.47 | 01.28 | 14.02 | 04.13 | 16.47 | 05.13 | 17.47 | 00.28 | 13.02 | — | 12.02 | 02.28 | 15.02 | 03.28 | 16.02 | 01.58 | 14.32 | 03.13 | 15.47 |
| 23. juni | 03.06 | 15.25 | 02.06 | 14.25 | 02.21 | 14.40 | 05.06 | 17.25 | 06.06 | 18.25 | 01.21 | 13.40 | 00.21 | 12.40 | 03.21 | 15.40 | 04.21 | 16.40 | 02.51 | 15.10 | 04.06 | 16.25 |